# Sendu hundarnar eftir spríttbilisti




**Ein bilførari ætlaði sær bestemt ikki at lata seg kanna fyri rúsdrekkakoyring leygarmorgunin, og tók beinini upp á nakkan og goymdi seg aftanfyri ein garð. Hundarnir funni hann tó**

POLITI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn greiðir frá, at tá løgreglan leygarnáttina vildi stegða einum førara og kanna hann fyri rúsdrekkakoyring, vísti tað seg sum at førari als ikki ætlaði tað sama.

Maðurin stakk av, setti bilin og rýmdi úr bilinum, fyri síðani at goyma seg aftanfyri ein garð nærhendis.

Tað vísti seg tó at vera somikið heppið, at ein av hundapatruljunum var nær við, og so vóru boð send eftir hundunum.

Hundarnir snoddaðu seg skjótt fram til tann rúsaða bilføraran og sostatt kundi staðfestast, hvør maðurin var og at hann var rúsaður og at hann hevði koyrt bilin og royndi at rýma undan løgregluni.

# Varðhaldsfongslaður í 15 dagar

**Ein maður varð í Føroya Rætti í gjár dømdur til 15 dagar í varðhaldinum, meðan harðskapurin, sum maðurin framdi, verður kannaður. Maðurin hevði forfylgt einum pari og brotið nøsina á manninum**

POLITI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




Um klokkan 4 leygarmorgunin, tá ein maður og ein dama eru á veg til gongu úr einum vertshúsi í Havn, verða tey fylgd av einum manni, ið hevur ilt í huga.

Maðurin, sum fylgir teimum kemur fram á tey, og vil bjóða hinum manninum av. Men hesin vil ikki vita av tí, og gongur víðari. Tá tann nú varðhaldsfongslaði ikki vil geva uppat, vendir maðurin sær við móti honum, og ætlar helst at geva manninum tvey borgarlig orð. Men í tí at maðurin vendir sær, fær hann nevan á gronina. Maðurin fellur til jarðar og verður so víðari illa viðfarin.

Álopni maðurin verður somikið illa hagreiddur, at hann hevur brotið nøsina, greiðir vakthavnadi í Havn frá.

Álopsmaðurin varð tó kendur, og kundi løgreglan longu tíðliga um morgunin fara eftir manninum, sum er ein kenningur hjá løgregluni, og so varð hann settur í grundlógaravhoyring í Føroya Rætti, har hann varð dømdur til 15 dagar í varðhaldinum, meðan málið veðrur gjøllari kannað.

# Harðskapur og hálka

**Vikuskiftið hjá løgregluni hevur sum heild verið merkt av serliga tveimum tingum – harðskapi og hálku**

POLITI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hálka og harðskapur hava sett sín dám á vikuskiftið hjá løgregluni.

Fríggjadagin seinnapart var sannur ferðsluruðuleiki í Kaldbaksbotni, har ferðslan steðgaði upp einu løtuna orsakað av ferðsluóhappi. Tríggir bilar høvdu figið skaða, ein teirra lá viðsíðuna av vegnum.

Gjøgnum vikuskiftið eru eisini fleiri fráboðanir komnar til løgregluna um ferðsluóhapp og dottin fólk orsakað av hálkuni.

Vakthavandi greiðir frá, at tað serliga er í lýsingini, at tað gerst serliga hált, tí mitt um dagin er vegurin ofta táur.

Men vikuskiftið hevur eisini verið nógv merkt av harðskapi. Umframt at ein maður varð varðhaldsfongslaður fyri at hava brotið nøsina hjá einum øðrum, so vóru eisini húsaófriður og okkurt annað harðskapsmál í býnum, serliga uttanfyri dansistøðini.

Í tí eina harðskapsmálinum var tað ein maður, sum skuldi leggja seg ímillum og forða einum bardaga. Hetta skuldi tó vísa seg at verða alt annað enn gløgt av honum, tí brádliga fær hann eina fløsku ella okkurt líknandi ting knúst í nakkan á sær.

Maðurin mátti á skaðastovuna, og fekk hann 6 stingir á høvdið. Gerningsmaðurin er ikki funnin enn, sigur vakthavandi.




**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FV 472 **Km:** 18.000
**Árgangur:** feb. 2008
**Útgjald:** 48.000 **Mðr. gjald:** 2.988 (5 ár)
**kr. 192.000,-**



**NISSAN PATROL 3.0** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 530 **Km:** 98.000
**Árgangur:** juli 2001
**Útgjald:** 60.000 **Mðr. gjald:** 3.516 (1,5 ár)
**kr. 115.000,-**



**BMW 320D DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KU 300 **Km:** 150.000
**Árgangur:** juni. 2002
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 3.306 (3 ár)
**kr. 136.000,-**



**HYUNDAI SONATA 2.4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MD 028 **Km:** 64.000
**Árgangur:** apríl 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.008 (4 ár)
**kr. 158.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HJ 690 **Km:** 25.115
**Árgangur:** mai 2007
**Útgjald:** 45.000 **Mðr. gjald:** 3.287 (4 ár)
**kr. 175.000,-**



**CITROEN C5 2.2 HDI STC.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SJ 415 **Km:** 104.452
**Árgangur:** mars 2004
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 2.947 (4 ár)
**kr. 155.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 TD**

**Skrásetingarnr:** UT 215 **Km:** 154.000
**Árgangur:** apríl 2003
**Útgjald:** - **Mðr. gjald:** -
**kr. 58 .000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 DIESEL VØRUV.**

**Skrásetingarnr:** JU 505 **Km:** 53.000
**Árgangur:** jan. 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 74.000,-**



**MITSUBISHI L400 4X4 V/MVG**

**Skrásetingarnr:** JF 388 **Km:** 250.000
**Árgangur:** feb. 1998
**Útgjald:** - **Mðr. gjald:** -
**kr. 38.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo